# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

*Tíðindaskriv frá Bolivia Hjálpini*



Studentaskúla og HF-næmingar bjóða sína arbeiðsmegi í ein dag.

Komandi mikudag, 3. februar, fara allir næmingar á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum at geva ein dag burtur av síni skúlagongd og í staðin arbeiða fyri at stuðla handverkaraskúlanum í boliviansku bygdini Coches. Hetta er ein skúli, ið føroyskur skúlaungdómur fekk bygdan fyri 20 árum síðani.

Í 1990 tóku allir skúlaungdómar líka frá 1. flokki upp til miðnámsskúlarnar og teir hægru skúlarnar og útbúgvingarstovnarnar seg saman og skipaðu fyri einum arbeiðsdegi – eitt sokallað "dagsverk" – har næmingarnir, í staðin fyri at fara í skúla, arbeiddu hvør í sínum lagi og skipaðu fyri ymsum sølum fyri at savna inn pening í ein dag. Tær 440.000 krónurnar, sum komu inn fyri arbeiðið henda dagin, vórðu nýttar at byggja ein skúla í teirri fátøku bygdini Coches í Bolivia. Hetta var ein handverkaraskúli, sum skuldi læra næmingarnar yrki sum jarnsmíð, mekanikk og seyming, so at ungdómurin har var betur fyri at fara út á arbeiðsmarknaðin og ikki endaði sum flest onnur, ið komu frá sum umstøðum, nevnliga sum tænastufólk uttan nevnisverd rættindi ella inntøku. Eisini vórðu bygd ein kostdeild og ein frítíðarskúli, fyri at børnini kundu verða hýst eftir skúlatíð.

Í 1995 gjørdi tánevnda Sjónvarp Føroya eina sending um skúlan, har millum annað varð tosað við drongin Bartholomé, ið gekk á skúlanum. Hann greiddi frá, at eftir lokna útbúgving ætlaði hann sær til býin at arbeiða, fyri síðan at fara út á bygd aftur at læra sínar vinmenn sítt handverk, tí teir onga útbúgving áttu til góðar.

Í dag, tjúgu ár seinni, stendur skúlin enn og er enn virkin, hóast umstøðurnar eru nógv versnaðar. Skúlin er enn bygdafólkinum kærur, tí eingi onnur tilboð eru til børnini, men skúlin hevur lítla og onga fígging fingið, síðan føroyski ungdómurin hjálpti teimum í 1990.

Hetta ætla næmingar í Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Hoydølum at broyta við at aftur skipa fyri einum arbeiðsdegi, har studentaskúlanæmingar, í staðin fyri at hava vanliga skúlagongd, fara út at arbeiða í ein dag. Verkætlanin verður kallað Bolivia Hjálpin, og hesin arbeiðsdagur verður mikudagin 3. februar. Ætlanin er, at hvør næmingur gevur í minsta lagi 300 krónur fyri at arbeiða í mesta lagi fimm tímar. Skúlin stuðlar verkætlanini við at niðurleggja tímatalvuna hendan dagin og lata næmingarnar fáa sín lærdóm gjøgnum at arbeiða fyri onnur.

Um nakar er áhugaður at stuðla verkætlanini við t.d. at bjóða arbeiði til ein dagsverkara, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Bolivia Hjálpina á tlf. 253408. Hetta kann vera einstaklingar, fyritøkur, handlar o.s.fr. Talan kann vera um alt fyrifallandi arbeiði, einasta treyt er, at lønin er í minsta lagi 300 krónur fyri at arbeiða í mesta lagi fimm tímar.

Bolivia Hjálpin er burturav fyriskipað av næmingunum sjálvum. Næmingarnir halda tað vera hóskandi at lata ein dag av teirra útbúgving at tryggja øðrum ungum úti í heimi eitt betri lív gjøgnum kunnleika. Peningurin, ið kemur inn mikudagin, fer óskerdur til handverksskúlan í Coches. Vónandi taka nógvir føroyingar undir við hesum átaki.

**Við vón um gott samstarv**

**Bolivia Hjálpin 2010**

Norðuratlantsbólkurin:

# Felags norðurlendska loysn á íslendsku kreppuna

**Høgni Hoydal og Sofia Rossen hava luttikið í Norðurlandaráðsfundunum, sum fyrst í vikuni vóru í Keypmannahavn. Fiskivinnupolitikkurin í ES, javnstøða og íslendska ice save málið vóru millum annað á skrá**

Sofia og Høgni luttóku týsdagin í partapolitisku nevndarfundunum í Norðurlandaráðnum. Tey eru bæði limir í Vinstra Sosialistiska Grøna bólkinum (VSG). Fíggjarkreppan og íslendska ice save málið var millum annað á skrá, har kjakast var um, hvussu Ísland kann sleppa úr kreppuni gjøgnum norðurlendska samstarvið og norðurlendskar loysnir. Norðuratlantsbólkurin og VSG kundu á fundunum staðfesta, at tann norðurlendska hjálpin í íslendsku kreppuni ikki hevur verið nøktandi. Norðuratlantsbólkurin mælti til, at føroyska fyrimyndin varð fylgd og vísti á, at um øll Norðanlond góvu eitt samsvarandi lán til Ísland, hevði hetta lætt munandi um gongdina at endurstovna íslendska búskapin og minkað um trýstið frá Bretsku og Hollendsku stjórnini.

Vaksandi ungdómsarbeiðsloysi í øllum Norðanlondum var harumframt á skránni og hevði norðurlendski felagsfundurin hesaferð valt at varpa ljós á javnstøðumálið.

Fiskivinnupolitikkurin í ES skal endurskoðast og hevur Norðurlandaráðið ein aktivan leiklut í hesum arbeiði. Mikudagin luttóku Høgni og Sofia, saman við limum úr Norðurlandaráðnum, limum úr ES parlamentinum, og Evropa kommisjónini, í einari ráðstevnu um evnið. Norðuratlantsbólkurin legði í kjakinum dent á, at tað hevur stóran týdning at norðurlendsku ES - londini verja rættin hjá norðurlendsku londunum uttanfyri ES, at umsita egnan fiskivinnupolitikk.

**Norðuratlants-bólkurin**

# Ein hjálpandi hond til Jógvan Páll Sevdal

Í farnu viku skrivaði Jógvan Páll Sevdal eitt lesarabræv. Í brævinum setur hann spurnartekin við menningarlæruna tí hendan ástøði ikki samsvarar við ein bókstavuligan lesnað av bíbliuni.

Hetta er eisini púra beint. Menningarlæran samsvarar ikki við tær báðar skapanarsøgurnar í fyrstu kapitlunum í 1. Mósebók. Skapanarsøgurnar sjálvar samsvara eingongd ikki, men tað hevur minni týðning. Tað týðningarmesta er, at Guðs orð verður tikið frammum alt annað, eisini tá tað er í andsøgn við seg sjálvt.

Eg skilji bara ikki, hví Jógvan Páll Sevdal velur at steðga við menningarlæruna. Tað finst hópin av øðrum vísindaligum viðurskiftum, sum eru í beinleiðis andsøgn við ein bókstavatrúgvan lesnað av bíbliuni. Tað kann vera, at Jógvan Páll bara ikki er greiður yvir, at hesi finnast. Hvussu er og ikki, so vil eg gjarna geva honum eina hjálpandi hond, so ljós eisini kann blíva varpa á onnur viðurskifti enn menningarlæruna, sum heldur ikki samsvara við eina bókstavuliga tulking av bíbliuni.

### Jørðin ferðast

Vísind hevur upp á mangar mátar staðfest, at sólin er miðpunkt í okkara sólarskipan, og at jørðin ferðast rundan um sólina. Hetta er í greiðari andsøgn við ein bókstavatrúgvan lesnað av bíbliuni. Í Josva 10:13 og Præd 1:5 lesa vit, hvussu sólin steðgar síni ferð yvir himmalin, undirforstaði at jørðin stendur still. At jørðin stendur still kann tað heldur ikki vera nakað sum helst ivamál um, tí ífylgi bíbliuni so stendur hon á nøkrum súlum, og hon vikast ikki (1. Sám 2:8, 1. Krýn 16:30, Job 9:6, Sálm 93:1, Sálm 104:5 osfr.).

### Talið PI

Í støddfrøði læra vit, at talið PI er eitt irrationelt tal sum byrjar við 3,14... Hetta tal lýsir forholdi ímillum ummál og tvørmál í einum hvørjum rundingi. Trupulleikin er bara tann, at hetta tal samsvarar ikki við ein bókstavatrúgvan lesnað av bíbliuni. Í 1. Kong 7:23 lesa vit um eitt stoypt kar, sum hevur eitt ummál á 30 alin og eitt tvørmál á 10 alin. Tað vil so siga, at PI = 3. Um vit altso lesa bíbliuna 100% bókstavuligt.

### Veðri

Hvønn dag hoyra vit í útvarpinum, hvussu eitt brúgvalag onkunstaðni ávirkar veðri í Føroyum. Tosa verður um HektoPascal, lágtrýst, millibar og so framvegis. Alt hetta tos er beinleiðis í andsøgn við ein bókstavatrúgvan lesnað av bíbliuni, tí har stendur heilt einfalt, at tað er Guð – og Guð aleina – sum stýrur veðrinum (5. Mós 11:14, 1. Sám 12:17, 1. Kong 17:1 osfr.)

### Trøll, talandi asnar og risar

Vanliga eru tílík fyribrygdi bert at finna í ævintýrum, men veruleikin er tann, at alt hetta er eisini at finna í bíbliuni (1. Mós 6:4, 4. Mós 22:28, Jes 13:21, Jes 34:14 osfr.). Tað má vanliga falla teimum bókstavatrúgv lesandi fyri brósti, at tílík fyribrygdir ikki verða tikin í størri álvara nú á døgum. Okkurt má gerast, so trøllini aftur blíva ein sjálvsagdur partur av føroysku náttúruni eins og tey vóru í forðum.

Sum Jógvan Páll Sevdal sjálvur sigur: "Bíblian vil altíð prógva sonn vísindi". Tað er alla æru vert, at roynt verður at fáa sett ein bókstavatrúgvan lesnað av bíbliuni fram um staðfesta vísind, men veruleikin er bara tann, at bíblian samsvarar ikki við nakra nútímans vísind. Tað stendur tískil eitt megnar arbeiði fyri framman hjá hesum persónum, og koma teir nakrantíð á mál so má øll vísind blakast fyri bakka, og samfelagi kann tá seta beina kós móti tí myrkastu miðøld, tá óvitan og pátrúgv settu dagsskránna. Livst so spyrst.

**Eivind Ortind Simonsen**
**Limur í Guðloysi**